VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

# Leiðari til Vøggustovu

Søkt verður eftir avloysara fyri leiðara í barnsburðarfarloyvi 30 tímar um vikuna frá 1. apríl 2004 til 31. august 2005.
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, lønt eftir lønarstig 22 til 28.

Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum. Tað verður væntað av umsøkjaranum, at hann á ein leiðandi og virknan hátt, saman við starvsfólkunum, kann tryggja stovninum eina positiva menning. Tað er týdningarmikið, at umsøkjarin hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir, hevur evni og vilja at samstarva á øllum økjum, er sjónligur í sínum leiðarastarvi og dugir at fáa síni sjónarmið fram.

Bert umsøkjarar, sum hava lokið námsfrøðiligt prógv ella líknandi prógv, kunnu søkja starvið.

Tað kann upplýsast, at eftir ætlan verður skrivstovufólk sett í starv, at taka sær av bókhald v.m.

Nærri fæst at vita um starvið frá Hannebeth Dam ella Katrin Bjarnadóttir á tlf. 31 31 31.

Umsókn við prógvum, viðmælum v.m. skulu verða stovninum í hendi innan **1. mars 2004.**

Umsóknir verða at senda til:

**Vøggustovuna á Konmansmýru**
Att: Nevndin
Hoyvíksvegur 41 B
100 Tórshavn

*Vøggustovan og Barnagarðurin á Konmansmýru eru sjálvegandi stovnur við heimstað í Tórshavn. Endamáli stovnsins er barnaansan um dagin. Í vøggustovuni eru 3 stovur, 35 børn og 12 starvsfólk.*

# Skrivstovu-lærlingur

Søkt verður eftir skrivstovulærlingi til byggivirki í Havn at byrja, skjótast tilber.

Áhugað kunnu senda umsókn saman við møguligum viðmælum/próvgum til:

**P/F Articon**
Postboks 3109
110 Tórshavn
tlf. 350 700

ARTICON

# Hølir til leigu

Skrivstovuhølir í Niels Finsensgøtu 37 til leigu.

**Tlf. 31 14 10**

SJÚKLINGAHOTELLIÐ HAVNSUÐI
Sjúklingahotellið Tórshavn

# Sjúkrasystir til Sjúklingahotellið Tórshavn

Vegna farloyvi søkir Sjúklingahotellið Tórshavn eina sjúkrasystir frá 1/5 til 31/11 2004.
Arbeiðstíðin er 37 tímar um vikuna í skiftandi vaktum við vikuskiftisvakt 3. hvørja viku.

Sjúklingahotellið Tórshavn er ein stovnur undir Familju- og heilsumálaráðnum.
Endamálið við stovninum er at hýsa føroyskum sjúklingum ið eru til viðgerð í Danmark og avvarðandi teirra.

**Arbeiðið fevnir millum annað um:**
- Vegleiðing, kunning og samrøður við sjúklingum og avvarðandi
- Samskipan við sjúkrahús innan H:S
- Sjúkraróktauppgávur
- Skrivstovuarbeiði

**Vit ynskja eina sjúkrasystir sum:**
- Hevur virkað sum sjúkrasystir í minst 3 ár.
- Hevur royndir innan bæði medicinska og kirurgiska viðgerð.
- Kann arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevnir.

Við at venda tær til Inu Frisdahl leiðara á tele +45 21 67 72 90 fæst nærri kunning um starvið.

Løn og setanartreytir: Eftir avtalu millum DSR og Keypmannahavns Kommunu.

**Umsókn við avrit av skjølum skulu sendast til:**

**Sjúklingahotellið Tórshavn**
Tåsingegade 29, 5 sal
2100 København Ø
att. Umsókn

**Umsóknarfreist er 24. februar 2004 kl. 14.00**


# Kunngerð

## um innangarðsútskiftingarfund fyri Norðskála bygd

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 9, verður boðað til útskiftingarfund mikudagin 26. mai 2004 kl. 11.00 í húsinum hjá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum á Oyrarbakka.

Til viðgerðar verður innangarðsútskifting av Norðskála bygd.

Nevndarlimirnir eru Marita í Brekkunum, Hósvík og Jákup Skoradal, Miðvágur.

Tórshavn, tann 6. februar 2004

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarnevndarformaður


VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

# Pedagogar

Vøggustovan á Konmansmýru søkir eftir tveimum pedagogum.
Eitt starv er 30 tímar um vikuna frá 15. mars 2004 og eitt er 30 tímar um vikuna frá 1. mai 2004

Í vøggustovuni eru 3 stovur við 12 børnum á hvørjari.

Vit bjóða tvey áhugaverd størv, har umsøkjarin fær møguleika til at gera sína ávirkan á stovnin.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- hevur góð samstarvsevni.
- ikki er bangin fyri at taka ábýrgd.
- er røkin, nærlagdur og álítandi.
- er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið.
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroytan og tryggan dag við virðing fyri einstaka barninum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran Katrin Bjarnadóttir á telefon 313131.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi seinast 01.mars 2004.

Røktar- og umlættingarheimið
Lágargarður

# Lágargarður søkir eftir húsavørði

Hálvtíðarstarv sum húsavørður er leyst at søkja til setan skjótast tilber ella eftir nærri avtalu.

Umsøkjarar skulu hava maskinmeistaraútbúgving og skulu kunna arbeiða aðru hvørja viku.

Starvið er lønt sambært sáttmála ímillum Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við neyðugum prógvum møguligum viðmælum skulu sendast til

**Leiðaran á Lágargarði**
Stoffalág 84
Box 1188
110 Tórshavn

Meira fæst at vita um starvið við at ringja 316788.

Umsóknarfreistin er til mikudagin 25. februar 2004.

# Partabræv til sølu

1 partabræv í Sp/f Niels Paula til sølu fyri hægsta boð.

**Tlf. 777 211**




# Útbjóðing

Vegna Gøtu kommunu verður arbeiðið at gera útstykking í Syðrugøtu hervið boðið út alment.

Arbeiði handlar í høvuðsheitum um at gera 200 m av vegi við tilhoyrandi tekniskum installatiónum.

Útbjóðingartilfari kann bíleggjast hjá EM Ráðgeving innan hósdagin 19. februar móti veðhaldi kr. 5.000,- sum verður at gjalda inn á konto í Føroya Banka, konto nr. 6460 - 2002657

Lisitatiónin verður í hølunum hjá EM Ráðgeving týsdagin 16. mars 2004 kl. 16.00. Boðini verða tá latin upp, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

**EM Ráðgeving Sp/F**
Heiðavegur 15A 1. th. · FO-600 Saltangará
Tlf.: 47 77 00 · Fax: 47 77 01
t-postur: emr@kallnet.fo


# Hús í Klaksvík til sølu

Ognin Stoksoyravegur 16 til sølu um hóskandi boð fæst:

Matr. nr. 81
Grundøki: 427 m²
Húsini: ca. 8,50 x 7,10 m í trimum hæddum

Á ognini er góður hjallur.

Húsini, sum hava frítt útsýni yvir vánna, eru gjørd úr betongi, uml. 1947/48 hava nýtt tak og deilvís nýggj vindeygu.

**Nærri upplýsingar á tlf. 457791 best eftir kl. 10**

E|ROKNSKAPUR

Bókhald • Fíggjarætlan • Roknskapur
Skattur og sjálvuppgáva • Fyrisiting v.m.

**E|Roknskapur Sp/f**
Dvørgastígur 9 • 100 Tórshavn
Tel: 322 570 • Fax: 322 572 • Far: 212 570
info@e-roknskapur.fo
www.e-roknskapur.fo

# Rørarbeiði

Vit átaka okkum at gera
- Hitaverksarbeiði
- Ventilatiónsarbeiði
- Sanitetsarbeiði

í høvuðsstaðarøkinum.

Tilboð verða eisini givin.

**Ring tlf. 225701· 317901 · 210168**

STUÐULSSTOVNURIN
The Faroese Student Grant Fund

# Skrivstovufólk/málsviðgeri

(fyri skrivstovufólk í barnsburðarfarloyvi)

***Starvið***
Av tí at eitt av starvsfólkum okkara fer í barnsburðarfarloyvið, er eitt áhugavert starv sum skrivstovufólk/málsviðgeri leyst at søkja á Stuðulsstovninum.

Høvuðsuppgávurnar verða m.a.:
- Málsviðgerð í ÚSUN-skipanini*
- Umsiting av lestarlánum
- Vanligar skrivstovuuppgávur

***Førleikakrøv***
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar hava
- Skrivstovuútbúgving og HH/student ella líknandi
- Góðan kunnleika til enskt í skrift og talu*
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv.
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt

***Vit bjóða***
- Eitt ábyrgdarfult, áhugavert og fjølbroytt starv í einum stovni í menning
- Sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning

***Setanar- og lønartreytir***
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalráðið og deildir/stovnar tess.

***Umsókn***
Umsókn við prógvum o.ø skulu sendast til:

**Stuðulsstovnin**
Stílað: Terja á Lakjuni
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
FO - 110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi seinasta lagi 19. februar 2004.

Starvið verður sett 1. apríl 2004 ella skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Terja á Lakjuni, leiðara á Stuðulstovninum, á telefon 356800 ella 44 47 39.

* Í ÚSUN-skipanini verður útbúgvingarstuðul veittur til tey, ið lesa uttanfyri Norðurlond. Tað er í hesum sambandi at kunnleiki til enskt er ein fyrimunur.

Stuðulsstovnurin er ein stovnur undir ***Mentamálaráðnum***, ið hevur til uppgávu at veita fíggjarligan stuðul til lesandi føroyingar. Á ***Stuðulsstovninum*** starvast 5 fólk. Stovnurin rindar mánaðarligan lestrarstuðul til umleið 1.800 lesandi í Føroyum og árligan ferðastuðul til umleið 1.100 lesandi uttanlands, umframt at veita lestrarstuðul til lesandi uttanfyri Norðurlond (ÚSUN). Harumframt krevur stovnurin inn lestrarlán frá umleið 2.700 persónum. Stuðulsstovurin hevur í 2003 eina útreiðslujáttan uppá 2,4 mió. kr., og veitt uml.69 mió. kr. í lestrarstuðli.

Landsfelag Pensjónistanna

# Ferðatilboð

Landsfelagið boðar frá at Pensjónistafelagið H.Ø.F.T. ger útferð til Ísland tann 9. juni, við tveimum bussum, sum taka 50 ferðafólk hvør. Hotelpláss er útvegað til 100 fólk.

Tann fyrri bussurin er fullsettur. Fólk, ið hava áhuga til tann seinna bussin, biðjast um at ringja til Smyril Line, telefon 345900.

**Landsfelag Pensjónistanna**

**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Lágarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820

SKEIÐ við Dr. Atle Dyregrov

Verður 18. mars á Hotel Føroyum frá kl. 08.00 - 15.30

Kostnaður fyri skeiðið er kr. 1450,- u/MVG

Íroknað skeiðið er:
· morgunmatur
· 2 x kaffi við køku
· gott sjálvtøkuborð við 1 øl/vatn

Tema á degnum:
**Sorg og trauma hjá børnum**

· Sorg og traumareaktiónir hjá børnum

· Góðir tilbúgvingarvanar til tey sum ansa børnum

· Hjálp til børn í samband við kreppu, sorg og trauma
  · hjálp beint eftir hendingina
  · langtíðaruppfylging

· Hjálp í barnagørðum og skúlum
  · nýtsla av ritualum
  · nýtsla av bólkum
  · sjálvhjálparhættir

· Viðgerð/terapi av børnum aftaná sorg og trauma

Team85

Tilmelding á heimasíðu, telduposti, á tel millum kl. 13.00 - 16.00 ella fax 322355

Synergi
synergi@synergi.fo · tel 22RING (227464) · tel 22KIMA (225462) · www.synergi.fo